# Teldutøkur undirvísingarpartur

Sum lærarar nýta vit ymiskar undirvísingarhættir, alt eftir, hvat ið hóskar til okkara og til undirvísingarløtuna. Tað kann vera gott við skiftandi arbeiðshættum.
Í sambandi við Súluna eru ymsir møguleikar. Vit kunnu nýta bókina einsamalla, saman við glæru ella saman við teldutøka tilfarinum. Teldan kann gera undirvísingina øðrvísi og spennandi. Við henni hava vit nakrar fyrimunir, eisini námsfrøðiligar, sum vit ikki fáa aðrastaðni.

Tað eru fleiri orsøkir til, at vit hava valt at hava bókina teldutøka:

- Tilfarið verður lýst upp á skíggja í skúlastovuni. Tað er ein góð hjálp hjá næmingunum, at teir síggja bæði mynd og tekst, meðan prátað verður. Tað ber til at peika á ymiskt við peikipinni ella mús, meðan vit tosa um tað, vit síggja, lesa ella syngja.

- Myndin kemur fyrst, bert ein mynd, einki annað. Børnini skulu tá bert hugsa um hesa einu myndina, har er einki, sum órógvar.

- Meðan myndin er á vegginum, fáa við gjøgnumgingið og sett navn á tey orð, ið vit vilja læra børnini. Tað eru fyri tað mesta orð við bókstavinum í, sum vit gjøgnumganga. Eisini fáa vit tosað um trupul orð í tekstinum, og vit fáa orðamyndir festar á veggin ella talvuna, sum børnini seinni kunnu nýta sum hjálparorð. Soleiðis eru børnini frammanundan gjørd kunnug við tekstin, ið kemur.

- Við mynd – og við hvørt mynd saman við teksti – á vegginum er lætt at fáa nógv góð prát við næmingarnar, og hetta at tosa við børnini, at geva teimum eina vitan, nýggj orð og hugtøk, er eisini týdningarmikið í sambandi við lesing.

- Tá ið teksturin verður vístur á skíggjanum, síggja næmingarnir eina reglu í senn. Hetta ger tað lættari at lesa og gevur betri yvirlit. Lærarin ger av, nær næsta regla kemur á skíggjan við at klikkja á músina, og kann soleiðis tryggja sær, at allir næmingar hava fingið tað við, sum lisið er.

- Tað ber til at spæla sær við ávísum orðum og ljóðum (sí gjøgnumgongdina á komandi síðum).
- Børnum dámar væl, at myndir og bókstavir koma á skíggjan upp



Úr Súluni. Lærarabók. Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, 2008. © Føroya Skúlabókagrunnur.

á nógvar ymiskar stuttligar mátar. Bókstavirnir fáa lív og eru meira eyðsýndir enn í einari bók.

- Við telduni hava vit enn ein fyrimun, sum vit ikki hava á glæru, ella um vit einans nýta bókina, og tað eru ljóðini, ið eru løgd á síðuna. Her eru nógv ymisk ljóð, so sum fuglaljóð og ymisk djóraljóð. Klikkir tú t.d. á ein fugl, hoyrist hvussu hann letur. Á lærarasíðunum til hvønn bókstavin stendur tilskilað, hvørji ljóð eru á síðuni.

- Sangurin hoyrist, um tú klikkir á hátalararnar.



Úr Súluni. Lærarabók. Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, 2008. © Føroya Skúlabókagrunnur.

# Dømi um mannagongd í teldutøka undirvísingarpartinum

Mynd 1 – Íí




1. Fyrstu ferð klikt verður við músini, kemur bókstavurin fram.
   Gjøgnumgongd av bókstavinum, sí síðu 22.

2. Aðru ferð klikt verður, kemur myndin fram.
   Hugskot um, hvussu vit kunnu brúka sangin, er á síðu 22-23.

3. Triðju ferð klikt verður, kemur heitið á sanginum fram.

4. Fjórðu ferð klikt verður, kemur sangurin fram.

5. Sangurin er innspældur. Klikkir tú á hátalaran vinstrumegin, hoyrir tú lagið.
   Klikkir tú á hátalaran høgrumegin, verður allur sangurin spældur,
   og til ber at syngja við.

Flytur tú músina á vinstra horn niðast, koma pílar fram, sum tú kanst flyta aftur og fram við. Tú kanst eisini flyta aftur og fram við pílunum á knappaborðinum.



Úr Súluni. Lærarabók. Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, 2008. © Føroya Skúlabókagrunnur.

Mynd 2 – Íí




1 Fyrst kemur myndin fram, og vit fáa børnini at seta orð á tað, ið tey síggja.
Í tekstinum til myndina koma bókstavir fyri, sum børnini ikki hava lært, og tí orð, sum tey ikki duga at lesa uttan við hjálp.
Meðan vit tosa um myndina, hevur lærarin møguleika at geva børnunum tey orð, sum kunnu vera torfør at lesa fyri summi. Ein máti at gera hetta er, at lærarin setir mynd og orð á veggin í skúlastovuni, sum t.d.


fílur


síl

Tá ið teksturin verður tikin fram, hava børnini ein forkunnleika og eru betur før fyri at lesa tað, ið stendur skrivað.

Tað er sera týdningarmikið, at vit fyrireika børnini væl og geva teimum ta kensluna, at tað er lætt og stuttligt at lesa, og at tey megna uppgávuna. Eisini í fyrstani, tá ið tey bert duga fáar bókstavir.

2 Tá ið vit klikkja aðru ferð við músini, kemur fyrsta reglan av tekstinum fram, og hvørja ferð vit klikkja, kemur ein regla afturat, til allur teksturin er komin á skíggjan.

3 Tað eru nøkur orð, sum vit hava valt at spæla okkum eitt sindur við.
Í vegleiðingini kalla vit hesi orð 'livandi orð', av tí at vit fáa tey á skíggjan upp á ymiskar mátar, ein og ein bókstav í senn.
Endamálið við hesum orðum er at fáa arbeitt við ljóði og bókstavi.
Í teimum dømum, har vit hava 'livandi' orð, er tað ikki eitt ivamál um, hvat orðið skal vera. Orðið rímar altíð við eitt orð í tekstinum, sum vit hava lisið, og myndin sigur restina.
Í døminum, ið vit hava tikið fram her, kemur orðið tá á síðstu reglu ikki inn saman við hinum. Tað manglar, og lærarin spyr børnini, hvørjum orði tey halda, setningurin kann enda við.


Úr Súluni. Lærarabók. Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, 2008. © Føroya Skúlabókagrunnur.

Ætlanin er at fáa børnini at koma fram til orðið og binda saman ljóð og bókstav. Av tí at hetta eru rímorð, er tað bert ein partur av orðinum, sum skal skiftast út, og børnini skulu royna at finna tað ella tey ljóð, sum skulu setast í staðin. Tey vita kanska eisini, hvussu bókstavirnir eita, av tí at tey hava lært teir, og um so er, stava tey orðið, sum síðani kemur á skíggjan.

Tú hoyrir fílin, um tú klikkir á hann. Hvørji ljóð eru á teimum ymisku síðunum, er tilskilað í gjøgnumgongdini av bókstavunum.

Mynd 3 – Íí




Mynd 3 verður gjøgnumgingin á sama hátt sum undanfarna.

Mynd 4 – Íí




Vit enda hvørja ferð framløguna við bókstavinum.



Úr Súluni. Lærarabók. Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, 2008. © Føroya Skúlabókagrunnur.